# og prestar fara



*Hóast eingin nýggjur prestur er settur í fast starv seinasta hálvt triðja árið, hevur kirkjufólkið trúfast gingið kirkjugøtuna bæði í bygd og býi*
(Savnsmynd úr Gjáar kirkju

tó longu vitan um, hvørjir umsøkjararnir eru og ikki minst, hvat teir standa fyri.

Hinvegin er møguleiki hjá kirkjuráðunum at fáa nærri kunnleika til hetta, annaðhvørt við at bjóða umsøkjarunum á fund, fyri at læra viðkomandi betri at kenna, at hoyra hann prædika ella tey senda viðkomandi nakrar týdningarmiklar spurningar, sum tey fegin vilja hava svar uppá.

Eitt týdningarmikið evni í hesum umfarinum kann vera, hvørt presturin vil samstarva við bæði mannligu og kvinnuligu starvsfelagar sínar, um hesin vil víga fráskild, um hesin vil halda seg til liturgi'ina í kirkjuni og annað í tí sambandinum.

Men spurningar kunnu eisini vera av heilt øðrum slagi, t.d. um hvørjar ætlanir prestur hevur í arbeiðinum, um viðkomandi ætlar at skipa fyri serstøkum gudstænastum, hvussu hann hugsar sær undirvísingina fyri konfirmantum skipaða, hvørji skeið hann kundi hugsað sær at farið á, og kanska eisini um, hvussu viðkomandi fer at fyrihalda seg mótvegis fólki, ið ynskja t.d. dóp ella giftarmál.

Ein annar møguleiki er at kirkjuráðslimirnir sjálvir taka orðið og boða frá, hvønn umsøkjara sum tey persónliga halda vera tann rætta til at røkja kallið í prestagjaldinum.

## Draga ella spjaða

Henda løtan, tá tann einstaki umsøkjarin er til umrøðu, er – ella kann verða – tann avgerandi fyri, hvør sum at enda verður innstillaður sum tann fyrsti.

Givið er, at hin einstaki limurin í kirkjuráðnum kann hava sín favoritt til starvið. Men ynskið hjá øllum er uttan iva, at tann setti presturin verður til gagns og gleði fyri kirkjuna og kirkjufólkið á staðnum.

Líka so vist er tað, at fólkakirkjan er opin og breið, og skal vera fyri alt fólkið. Tað er tí kanska mest her, at sjónarmiðini kunnu standa ímóti hvørjum øðrum:

**Summi ynskja ein prest sum kann fevna um alt og øll. Summi vilja hava ein prest sum vil samstarva við kvinnuligur prestar. Summi vilja hava ein sum í prædikum sínum dregur fólkið nærri at Gudi. Summi vilja hava ein fólksligan prest. Summi ynskja ein prest sum ikki er fordømandi. Og summi ynskja ein prest sum er trúgvur ímóti siðum, liturgi'um, og sum annars er soleiðis sum ein prestur nú einaferð eigur at vera eftir teirra tykki.**

Á einum slíkum fundi er frítt at tala og siga sína hugsan, og kann hetta taka sína tíð. Ein máti fyri at fáa stytta um fundin og fáa svar frá øllum umsøkjarunum ísenn, er snøgt sagt at bjóða teimum øllum á henda fundin.

> *Givið er, at hin einstaki limurin í kirkjuráðnum kann hava sín favoritt til starvið. Men ynskið hjá øllum er uttan iva, at tann setti presturin verður til gagns og gleði fyri kirkjuna og kirkjufólkið á staðnum*

## Nr. 1, 2 og 3

Tá hesin parturin er liðugur fer bispur av fundi, og nú er upp til kirkjuráðslimirnar út frá tjakinum at innstilla tann prestin, tey ynskja sum fyrstvalda, um ein kann siga tað so.

Henda atkvøðugreiðslan er skrivlig og loynilig, og alt verður talt upp alment og undir eftirliti. Síðani verður sama mannagongd nýtt, tá nr. 2 og 3 skulu veljast.

Boðini um innstillingina verða síðani latin bispi so skjótt sum tilber, og er næsta stigið nú at hann handar innstillingina til Mentamálaráðið. Síðani er tað upp til landsstýriskvinnuna í kirkjumálum at útnevna prestarnar og seta teir í starv.

Seinasta punktið í hesi longu skrá er sjálv innsetingin av prestunum og dómprósti.

Sum longu nevnt er longu nú greitt, at Hanus á Gørðum verður innsettur sunnudagin, og at Uni Næss og Ann Dahl Hansen verða innsett 31. Januar. Ætlanin er somuleiðis at innseta prestarnar í embætini við Skálafjørðin og í Norðurstreymoy hinar báðar sunnudagarnar í hesum mánaðinum.

Tá hetta er gjørt mugu starvsfólkini á bispakontórinum beinanvegin fara undir sama arbeiðið einaferð aftrat: Greitt er longu nú, at prestastarvið í Fuglafirði er leyst, tí Uni Næs er vorðin dómpróstur. Og tað er somuleiðis greitt, at nýggjur prestur skal setast í Hvalvík, tí Mogens T. Petersen hevur boðað frá, at hann fer frá seinni í vár.

Og tað kundi meiri enn so borið á, at okkurt annað starvið aftrat verður leyst um stutta tíð!



*Við Vesturkirkjuna eru tveir prestar sum er. Men leygardagin verður avgjørt, hvør tann triði verður*



*Enn er støða ikki tikin til, hvør skal verða sóknarprestur í Sjóvar Prestagjaldi*



*Fólk í Kvívík er eisini spent eftir teirri avgerðini, sum kirkjuráðið er at taka leygardagin um prestastarvið*